# FYRST TAKA VIT SÍÐAN TAKA VIT






*The Dreams eru toppprofessionellir og veruliga rock'n roll allanvegin. Og professionalisman er galdandi á øllum økjum. Tað er væl skilligt, at teir hava hittað ferð eftir ferð í Danmark og nú eru á veg fram á týska tónleikapallinum*

**SUMMARFESTIVALUR** Veðrið var av tí allar fagrasta í Klaksvík í kvøld, tá Summarfestivalurin 2010 byrjaði við einum væl vitjaðum barnatiltaki á Føroya Tele pallinum kl. 19

Sissal Kampmann
Myndir: Jens Kristian Vang

Bilar, bátar, fólk, campingvognar, bussar v.m. í stríðum streymum hava inntikið Klaksvíkina síðan í gjár, og endamálið við innrásini er at njóta tónleik, mat og hvønn annan í tríggjar dagar á familjuvinaliga festivalinum, sum seinastu árini hevur verið plágaður og tvungin í knæ av veðurgudunum, sum avgjørt ikki hava víst tiltakinum nakra náði.

## Summar og familju festivalur

Tónleikurin á Summarfestivalinum, festivalurin sum marknaðarførir seg sum hin mest familjuvinarligi festivalurin í Føroyum, er á trimum pallum: Stórapalli, sum er høvuðspallurin, Flags Tjaldið og Føroya Tele pallin, ið er hin minsti. Í skrivandi løtu oysir tað tíverri niður í Klaksvík. Regnið buldrar niður á tekjuna, og fólk renna undir tekjur og annað fyri at finna sær skjól.

– Hetta var ein heldur óheppin háttur at enda eitt annars væleydnað kvøld uppá, bæði tá talan er um veður og vind, og ikki minst í mun til tónleikaframførslurnar. Sum áður nevnt, byrjaði SF við einum barnatiltaki á Føroya Tele pallinum kl. 19, og síðan hildu framførslur á framm, slag í slag.

## Íslendskt/føroyskt gullsamstarv

Ungu kvinnurnar, íslendska Ingunn Kristiánsdóttir og Herborg Hansen, sum er úr Klaksvík, framførdu á Føroya Tele pallinum saman við guitar- og trummuspælaranum Pætur Gerðalíð kl. 21.00. Tær hittust á Red Cross School Nordic United World College í Noregi í 2008. Síðan tá hava tær spælt nógv saman. Í ár eru tær lidnar á skúlanum og liva nú tónleikadreymin út, og tað gera tær væl. Uttan smædni og við eini ótrúliga vælupplagdari og charmerandi framførslu megnaðu tey trý at geva teim mongu áhoyrarunum eina góða tónleikauppliving, sum var sermerkt á fleiri ymiskar hættir.

## Lost in translation?

Tað, ið var mest serligt við framførsluni hjá teimum vóru væl eydnaðu og væl framførdu umsetingarnar av enskum, føroyskum og donskum sangum til íslendskt. - Móðirmálið hjá Ingunn. Ma. framførdu tær "Tú" hjá Moira, "Right next to the right one" hjá Tim Christensen og 80´ara hittið "Alone" hjá Heart á íslendskum.

– Eg haldi, at tað er týðningarmikið, at tónleikarar royna at halda seg til røturnar, bæði málsliga og mentanarliga, sigur Ingunn, sum er sangari í bólkinum. – Av og á er ein "lost in translation", men eins ofta er tað líka torført at umseta sangir, man hevur skriva á einum máli, td. á føroyskum, til eitt annað mál, td. enskt, greiður Ingunn frá. - Til dømis hevur tað ikki borið til at umseta sangin "Dag um dag", sum Herborg hevur skrivað til td. enskt. – Hann riggar bara á føroyskum, og so er onki at gera við tað!

## Elvis í niðurdeili.

Framførslan hjá teimum trimum gjørdist enn betur við fantastisku aðrustemmuni hjá Herborg, sum komplimenteraði Ingunn á best hugsandi hátt. Við trummuni og guitarspælinum hjá Pæturi afturat, var hetta ein framførsla, sum avgjørt var verd at hoyra og síggja. Tað er heldur ikki hvønn dag, at vit hava høvi til at hoyra eina kvinnu framføra "Blue Suede Shoes" á ein so Elviskulan máta, sum Ingunn gjørdi í dag, við sínum charmerandi íslendska accenti, sum fekk áhoyrararnar at smíla og kenna seg væl undirhildnar bæði so og so.

## Tað feitasta!

– Hetta var tað feitasta, segði ein glaður og sveittur, Heini Gilstón Corfits eftir framførsluna hjá The Dreams í Flags Tjaldinum. Ikki løgið, at hetta var tann kenslan guitarspælarin hevði eftir konsertina hjá The Dreams, sum byrjaði í Flags Tjaldinum kl. tíggju í kvøld, tí teltið var stúgvandi, stappandi fult av væl uppløgdum og spentum áskoðarum, sum komu at hoyra bólkin spæla.

– Eg haldi, at tað var nógv betur at spæla á hesum pallinum enn á tí stóra, sigur